## Stjólu ein hval

**Tríggir sundalagsmenn eru skuldsettir fyri at hava stolið ein hval í grindini, sum legði beinini í Hvalvík sunnukvøldið**

GRIND
*Ingrid Bjarnastein*

Sunnukvøldið legði ein grind beinini í Hvalvík. Grindin taldi 152 hval, og varð dripin beint fyri midnátt sunnukvøldið. Eini 200 bátar luttóku í drápinum við umleið 1100 monnum, umframt fólk á landi.

Klokkan trý sunnunáttina fekk løgreglan boð um, at tríggir sundalagsmenn høvdu stolið ein hval. Teir høvdu hongt hann upp á bátin, og vóru farnir avstað við honum. Teir verða skuldsettir fyri stuldur.

# Burturblivin kom aftur í øllum góðum

**Ein 47 ára gamal maður varð fríggjadagin eftirlýstur. Hann var farin frá húsum týsmorgunin og hevði sagt, at hann kom heimaftur í seinasta lagi fríggjadagin. Stór leiting var sett í verk í vánaligum líkindum, men sunnumorgunin kom maðurin aftur í aftur í øllum góðum**

LEITING
*Ingrid Bjarnastein*

Fríggjakvøldið var ein 47 ára gamal maður eftirlýstur í Suðuroynni. Hann var farin av Tvøroyri týsmorgunin við tí fyri eygað at tjalda nakrar dagar í Hvannhaga og Vatnsdali. Tá hann fór heimanífrá segði hann, at hann kom aftur hósdagin ella í seinasta lagi fríggjadagin.

– Maðurin hevði tjald, soviposa og útgerð annars við sær, men tá hann ikki var komin aftur fríggjakvøldið gjørdust tey avvarðandi bangin um hann. Men av tí, at tað var so seint á kvøldi gjørdu vit av at bíða við leitingini til í lýsing leygarmorgunin, greiðir Jaspur Vang, virkandi sýslumaður í Suðuroynni frá.

– Suðuroyar norðara bjargingarfelag og nógvir sjálvbodnir menn tóku lut í leitingini, sum fór í gongd leygarmorgunin klokkan 4. Talan var um eini 50 mans, og leitað var bæði á landi og sjógvi, umframt, at tyrlan og politihundurin eisini vóru við.

### Ring líkindi

Bátur fór av Hvallba og leitaði á eystaru síðuni á oynni út fyri Hvannhaga. Staðkendir menn fóru bæði úr Hvalba og av Tvøroyri, men líkindini til at leita vóru ógvuliga vánalig. Stormur var á fjøllunum, og ælini vóru ógvuslig.

– Leitað varð allan seinnapartin, men leygardagin sluppu vit ikki til tvey øki. Annað omanfyri tunnilin og hitt á vestursíðuni, har tað var ógvuliga turbulent og nógvur mjørki. Vit gjørdu so av at steðga leitingini og lata menn hvíla, og leggja aftur til brots sunnumorgunin, sigur sýslumaðurin.

Byrjað varð aftur sunnumorgunin, og fóru tá umleið 80 sjálvmodnir mans frá húsum. Økið varð tá eisini víðkað til hagarnar í Froðba, so nú varð leitað bæði í hagunum í Hvalba, Froðba og Trongisvági.

– Klokkan 10.55 sunnumorgunin fingu vit eina fráboðan um, at ein bilur hevði tikið ein mann uppí, sum var staddur við tunnilsmunnan Trongisvágsmegin. Hann segði seg vera persónin leitað varð eftir, og hevði biðið um at verða koyrdur heim til skyldfólk á Tvøroyri. Vit ringdu til teirra, og fingu staðfest við vissu, at tað var hann, sum var komin heimaftur í øllum góðum, greiðir Jaspur Vang frá.

Politiið hevði mánamorgunin framvegis ikki tosað við mannin sjálvan, men eftir tí, sum teir høvdu fingið upplýst, so ætlaði maðurin sær úr Hvannhaga til Hvalbiar, men av tí, at mjørkin var so tjúkkur, og hann ikki er staðkendur, so setti hann tjaldið uppaftur og steðgaði til mjørkin lætti eitt sindur. Maðurin hevur ikki etið í tveir dagar, men hevði tað eftir umstøðunum gott.

– Ein risaleiting varð sett í verk, men tá tað er menniskjalív, sum stendur uppá spæl, so er tað ikki ov nógv. Eitt risastórt leitingararbeiði er gjørt av sjálvbodnum, og tað hevur heldur ikki verið heilt vandaleyst at leita undir slíkum umstøðum, sigur Jaspur Vang.

Tá greitt var, at maðurin var afturkomin í øllum góðum, varð leitingin avblást, og manntal varð hildið, so ongin gekk og leitaði eftir í mjørkanum sunnudagin.

Eitt brúdleyp skuldi vera leygarkvøldið, men tað var avlýst tí maðurin var burtur. Men tað varð hildið í øllum góðum sunnukvøldið ístaðin fyri.



## Støðugari lánsbrævarentur næstu dagarnar

MARKNAÐARRÁK

Síðani seinasta Marknaðarrák, eru sera ógvusligar broytingar farnar fram á lánsbrævamarknaðunum. Serliga longru amerikansku renturnar eru hækkaðar nógv, og hetta hevur m.a. togað longru donsku lánsbrævarenturnar við sær uppeftir. Orsøkin er enn einaferð, at uppgerðir vísa, at sum heild gongur betur í amerikanska búskapinum. Hóast ávisar uppgerðir hava víst á eina sera positiva gongd í amerikanska búskapinum, fóru arbeiðspláss fóru fyri skeyti í USA í juli. Trupla støðan á amerikanska arbeiðsmarknaðinum kann stundum fara at tálma positivu gongdina, men tað er ein sannroynd, at framgongdin í USA er um at finna støðufesti. Hesi viðurskiftir hava longu trýst longru lánsbrævarenturnar heilt fitt uppeftir, og fyribils skal tískil ikki roknast við, at hesar fara at hækka nógv meira komandi vikurnar.

Meginparturin av størstu amerikansku partafeløgunum hava nú kunngjørt roknskap teirra fyri næsta ársfjórðing í ár. Hóast okkurt vónbrot hevur verið, kann avgjørt sigast, at roknskapirnir sum heild hava verið góðir. Tó skal vísast á, at ein av orsøkunum til góðu roknskapirnar er sparingar og at virkini í størri mun royna at fullnýta tilfeingi teirra. Seinastu vikurnar hava partabrævamarknaðirnir sum heild ikki flutt seg nógv. Orsøkin til hetta er, at marknaðirnir eru hækkaðir nógv síðani mars og at teir nú royna at styrkja støðu sína. Um marknaðirnir hækka ella lækka í næstum er tengt at búskapargongdini.

Seinasta vika var sera nógv ávirkað av at búskaparlig lyklatøl vóru kunngjørd. Hesa vikuna verður meira avmarkað við lyklatølum, og meginparturin av fjøltjóðaðu virkjunum hava kunngjørt roknskapirnar. Tí kann roknast við, at henda vikan gerst meira friðarlig, og at renturnar ikki fara at broytast eins nógv, sum tvær tær seinastu vikurnar. Av tí at renturnar eru hækkaðar sera nógv í seinastuni, kann tó væntast, at ein mótrørsla kann fáa renturnar at lækka eitt vet hesa vikuna.

Hóast flestu av heimsins størstu virkjum hava kunngjørt roknskap, eigur Cisco Systems tørn mikudagin. Herumframt kann nevnast at fjarskiftisvirkini Tele2 og TDC kunngera týsdagin og at Novo Nordisk eisini kunngerð mikudagin. Fleiri evropisk fjarskiftisfeløg hava kunngjørt góðar roknskapir og tí kann væntast, at eisini Tele2 og TDC fara at kunngera góð tøl. Orsakað av búskaparligu framgongdini kann sama væntast frá Cisco.

| Rentur | | | | Partabrævavísitøl | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% | → | KFX, Danmark | 214,3 | -0,4% | ↓ |
| 2 ára lánsbræv | 2,96% | 0,29% | ↑ | OMX, Svøriki | 568,1 | 1,0% | ↑ |
| 5 ára lánsbræv | 3,69% | 0,21% | ↑ | DJ Stoxx 50, Evropa | 2.433,1 | -0,2% | ↓ |
| 10 ára lánsbræv | 4,36% | 0,08% | ↑ | S&P 500, USA | 980,2 | -1,6% | ↓ |
| **Íløgufeløg** | | | | **Gjaldoyra** | | | |
| Lánsbrøv í DKK | 106,10 | -0,6% | ↓ | USD | 657,57 | 1,7% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 164,40 | -0,9% | ↓ | EUR | 743,05 | 0,0% | → |
| Norrøn Partabrøv | 65,25 | -0,1% | ↓ | GBP | 1.060,52 | 0,9% | ↑ |
| Altjóða Partabrøv | 71,71 | 1,4% | ↑ | NOK | 90,80 | 0,6% | ↑ |

Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan

Vika 32, 2003
www.kaupthing.fo



# Skattaborgarin stendur við endan

**Kemur eitt endurgjaldskrav frá reiðarínum hjá Jógvani S, sum rætturin tekur undir við, endar tað í landskassanum, og skattaborgarin skjal gjalda, sigur løgfrøðingur**

ENDURGJALD
*Edvard Joensen*



*Eitt møguligt endurgjald til reiðaríið hjá Jógvani S fer at enda hjá vanliga skattaborgaranum umvegis landskassan, vísir Bjørn á Heygum, løgfrøðingur á*

Eitt møguligt endurgjaldskrav frá reiðarínum hjá Jógvani S fer at enda hjá skattaborgaranum, sigur Bjørn á Heygum, løgfrøðingur. Ábyrgdin hjá landsstýrismanninum er politisk, og embætismeninir, sum skrivað hava undir tilsøgnina, hanga neyvan upp á nakað fíggjarligt krav, sigur hann.

Hóast hann heldur tað vera løgið, at landsstýrismaðurin, sum sat, tá málið um Jógvan S varð avgreitt, ikki fekk málið á sítt borð, er Bjørn á Heygum ikki í iva um, at ábyrgdin er hansara.

– Nú er Jørgen Niclasen ikki landsstýrismaður meira, so Jacob Vestergaard hevur arvað politisku ábyrgdina. Men fíggjarliga ábyrgdin áliggur Fiskimálaráðnum. Og tað vil í seinasta enda siga vanliga skattabrogaranum, um tað kemur so langt. Men tað verður so rætturin at avgera, leggur Bjørn á Heygum dent á.

Sjálva tilsøgnina um veiðiloyvi til Jógvan S hava tveir embætismenn skrivað undir. Men teimum kann ikki leggjast nakað endurgjaldskrav í móti, metir løgfrøðingurin.

– Kemur tað so vítt, má tað vera tí, at okkurt kriminelt er farið fram, vísir hann á.

Hinvegin kann tað koma so vítt, um talan er um grovt forsømilsi ella mistøk í embætisførsluni, at tað kann koma at ganga út yvir størvini hjá viðkomandi embætismonnum. Men heldur ikki tað vil Bjørn á Heygum siga nakað ítøkiligt um í hesum ávísa málinum.

– Eg kenni tað ikki nóg væl til tess, sigur hann.

Men Bjørn á Heygum undrast stórliga á, at eitt slíkt mál sum hetta, skal vera avgreitt av tveimum embætismonnum, uttan at tað skal vera komið til landsstýrismannin yvirhøvur.

Men soleiðis sigur Jørgen Niclasen, sum var landsstýrismaður, tá málið varð avgreitt, at tað fór fram.

– Málið er ongantíð komið á mítt borð. Nú aftan á dugi eg at síggja, at tað skuldi tað helst verið, sigur hann. Men eg hevði fulla politiska ábyrgd av tí.

Bjørn á Heygum heldur tað vera nokk so løgið, at málið ikki hevur verið hjá landsstýrismannin. Serliga tá hugsað verður um, hvussu nógv málið líkist øðrum málum um veiðilovyi, sum hava verið frammi undan hesum.

– Tað átti at verið nokk til, at farið varð meira varliga fram og allir instansir vóru tiknir við upp á ráð, heldur løgfrøðingurin.

Sosialurin spurdi annan av embætismonnumnum, sum hava skrivað undir tilsøgnina til reiðaríið hjá Jógvani S, um tað var vanlig mannagongd, at slík mál vórðu avgreidd, uttan at landsstýrismaðurin visti av.

Embætismaðurin hevði ikki hug at gera viðmerking til málið beint nú, segði hann.

Heldur ikki Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, vil gera fleiri viðmerkingar í løtuni.

Hann hevur hugsað um støðuna um vikuskfitið og sigur seg standa við sína støðu, sum hann ikki vil kunngera, fyrr enn tær møguligu politisku og løgfrøðiligu avleiðingarnar eru kannaðar gjølla.

## Grani varð keyptur við veiðiloyvi



*Línuskipið Grani varð keypt við øllum loyvum og hevur ongantíð verið partur av nøkrum flutningi av veiðiloyvum millum skip*

*Mynd. Skipalistin*

**Í samband við viðgerðina av málinum um Jógvan S, hevur línuskipið Grani eisini verið uppi og vent. Men Grani hevur ongantíð fingið flutt nakað veiðiloyvi frá nøkrum øðrum fiksifari, vísir eigarin á**

VEIÐILOYVI
*Edvard Joensen*

Hóast teir, sum í dag eiga línuskipið Grana á Tvøroyri, keyptu hann, stutt eftir, at teir høvd selt tann væl minni bátin Akraleiti, var eingin flutningur av veiðiloyvum í tí sambandinum. Akraleiti varð selt við sínum loyvum, og Grani keyptur aftur við sínum egnu loyvum.

Í einum lesarabrævi í seinastu viku í samband við málið um Jógvan S hevur verið ført fram, at Skørin hevur verið innblandað í nógv mál um veiðiloyvi. Tað fyrsta skuldi sambært hesum lesarabrævinum vera, tá báturin undir navninum Akraleiti varð selt, og eigararnir fingu línuskipið Grana í staðin. Grani er nógv størri enn Akraleiti, sum seinni er vorðið kent undir navinum Skørin.

Eirikur Olsen á Tvøroyri, sum átti Akraleiti og er skipari á Grana, sigur at har er okkurt komið heilt galið fyri við upplýsingunum.

– Tað er rætt, sigur Eirikur Olsen, at Akraleiti varð selt til Nólsoyar í 1990. Og tað er eisini rætt, at vit seinni í sama ári keyptu línuskipið Skortaberg, sum áður hevði itið Reynsatindur og Kangeq. Men Akraleiti varð selt við øllum loyvum, og vit keyptu Skortaberg við veiði- og fiskiloyvi. So einfalt er tað, vísir hann á.

Tiskil er tað skeivt at blanda Grana upp í málið um Jógvan S, hóast fiskiloyvið hjá Akraleiti umvegis einar tríggjar seinni eigarar, er endað sum partur av málinum undir navninum Skørin, vísir Eirikur Olsen á.

# Álit og trúvirði blikna

**Tá vanligi borgarin ikki skilir hvat gongur fyri seg, missir hann álitið á bæði politisku skipanina og embætisførsluna í umsitingini, heldur formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum**

JÓGVAN S
*Edvard Joensen*



Vanligi føroyingurin missir álitið á umsitingini og politiska valdinum, tí hann skilir ikki tað, sum fer fram, heldur formaðurin í einum av samgonguflokkunum.

– Vit skuldu hava ein skipan, sum var gjøgnumskygd, men málið um Jógvan S vísir, at høvuðstrupulleikin í øllum er júst, at vanligi maðurin ikki skilir skipanina og mannagongdirnar, ið brúktar verða, staðfestir Kári P. Højgaard formaður Sjálvstýrisfloksins.

– Nú skal Jacob Vestergaard koma við síni niðurstøðu, sum vit so fara at taka støðu til, sigur hann.

*–Nú missir borgarin álitið á skipanina, og trúvirðið rýkur, sigur Kári P. Højgaard, formaður í Sjálvsstýrisflokkinum*

Men tað er greitt, at hetta er eitt óheppið mál, har Jacob Vestergard kemur at sita eftir við svartaperi, líkamikið, hvat han kemur til. Og hetta málið fer eisini at skaða trúvirðið og álitið á skipanina.

Landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum skal hava frið at avgreiða málið um Jógvan S, uttan at vit fara at siga nakað um misálitsuppskot ella annað tílíkt, sigur Kári P. Højgaard.

– Jacob Vestergaard hevur arvað ein trupulleika, hann ikki er partur í, og tað er óheppið at fara at leggja træyst á hann, meðan málið verður viðgjørt, sigur sjálvstýrisformaðurin.